Filmsvika



*Bergur Johannesen ummælir*

# Saman standa vit sterk



**Ein vakur familjufilmur, har uttan iva okkurt eyga var vátt móti endanum. »Elina – som om jag inte fanns« er um smágentuna, Elina, ið stutt síðan hevur mist pápan. Hon byrjar aftur í skúlanum í lítlu bygdini í norður Svørríki eftir eina longri sjúkralegu**

**»ELINA - SOM OM JAG INTE FANNS«**

★★★★☆☆

Í lívinum hjá Elinu spælir pápin ein stóran leiklut. Hóast hann er deyður, so tosar Elina við hann hvønn dag. Lítla systur hennara og mamman halda hana vera óða í høvdinum, men Elina leggur ikki í. Fyri hana livir pápin enn í staðnum hjá teimum báðum, mýrini, ið hann hevur lært hana at ganga í. Tá hon byrjar aftur í skúlanum, kemur hon út fyri torførum støðum, ið stranga flokkslærarinnan setur hana í. Við stuðli frá nýggja unga læraranum og treiska og góða lyndinum hjá pápanum, megnar hon tó at vinna á øllum.

Søgan er rørandi og lærandi, smágentan talar reint inn í hjartað og støða hennara nemur einhvønn. Leiklutirnir í filminum standa væl saman um stóru heildina. Neyðarsliga mamman, ið hevur lítlu systrina við sær, stranga lærarinnan, ið øll læra at hata gjøgnum filmin, skilagóða Elina, sum ongin í filminum tó skilur. Saman flætta allir hesir persónar ein film, ið nemur nógv ymiskt og dregur øll inn í støðuna hjá høvuðspersóninum.

Í skúlanum skilja vit, at mismunur verður gjørdur á børnunum, finsku børnini eru minni mett og lærarinnan er beinleiðis órein móti teimum. Uttan at hava innlit í søguligu støðuna, er greitt at Elina berjist fyri tí rætta. Meiningar vera gjørdar, og fólk kenna seg aftur í hjartalagnum hjá Elinu.

Landslagið er vakurt, og filmurin er fullur av vøkrum myndum, ið prýða um. Væl spældur og samansettur, ein góður familjufilmur. Tó hevur hann ikki tað, ið skal til at gerast ógloymiligur. Frálíkt undirhald fyri børn og vaksin í 77 minuttir.

# Tragikomiskt ella komiskt tragisk

**Roy Andersson býður hyggjarunum inn um í eina veruleikakenda verð, ið er syrgilig, keðilig og á ein hátt stuttlig. Persónarnir eru sum menniskju, tikin úr veruleikanum, als ikki spennandi, men syrgilig, vánalig og keðilig**

**»DU LEVANDE«**

★★★★★☆



- Í nátt, tá droymdi eg ein dreym. Og tað var als ikki hugnaligt, skal eg siga tær, soleiðis sigur maðurin, sum situr í bilinum, ið koyrir seint framvið upptøkutólinum. Upptøkutólið stendur stilt og lang frástøða er til persónarnar. –Eg var til eina familjuveitslu, men eg var ikki í familju við nakran, og eg kendi ongan. Maðurin, ið koyrir bilin greiðir frá dreyminum, ið endar við at hann verður blakaður í eletriska stólin, tí hann hevur brotið eina skál.

Vit hitta ymisk menniskju á leiðini, hvørt við síni støðu, hvørt við sínum trupulleikum og síni áskoðan á lívið. Filmurin er um tey, ið annars ikki høvdu verið filmað - tey, sum eru ov vanlig. Trupulleikarnir vera lýstir stuttligt, og keðiligu seinu klippingarnar og drúgvu senurnar skapa eina løgna spenta atmosferu millum hyggjararnar.

Nógv vóru um at bresta, tá tragiski komikkurin var í hæddini.

**Øðrvísi**

Pallarnir eru stórir og upptøkutólið er stilt, langt burtur frá persónunum. Ikki ein tann einasta klipping í eini senu ella ein nærmynd er. Hesi eru øll amboð til at skapa júst hendan stemning í salinum, sum eisini merkir allan filmin.

Menniskjan er lýst hjálparleys, sjálvsupptikin og tó søkjandi eftir eydnu. Ber tað til at hyggja eftir filminum, uttan at hugsa um vanligar reglur og snið, er hann ótrúliga hugvekjandi og stuttligur.

Hann er tó ikki eins góður sum filmurin hjá Roy Andersson frá 2000, »Sånger från andra våningen«. Byrjanin er heilt ótrúlig, og løgni stemningurin greip øll í salinum. Men sum gongur móti miðjuni fer luftin úr, á ein hátt. Sparkið, ið lyftir fyrstu senurnar á eitt støði, ið eg vil kalla "genialt", manglar. Kortini er filmurin samanumtikið heilt ófatiliga hugvekjandi, stuttligur og ikki minst øðrvísi.